

sansir.fo

# STARVSFÓLK TIL MÓTTØKUNA Í TINGANESI

Søkt verður eftir tveimum fólkum 6 tímar um dagin at taka telefonina og taka ímóti viðskiftafólki í Tinganesi at byrja 1. oktober 2007.

Telefonmóttøkan fevnir í løtuni um Løgmansskrivstovuna, Innlendismálaráðið, Vinnumálaráðið og Mentamálaráðið.

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávan er at taka sær av telefonmóttøkuni, ráðgeva borgarum og myndugleikum og taka ímóti viðskiftafólki.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava miðnámsúbúgving, yrkisútbúgving ella viðkomandi arbeiðsroyndir. Umsøkjarar skulu vera tænastuhugaðir, duga at málbera seg á føroyskum, donskum og enskum máli, hava teldukunnleika á brúkarastøði, vera nærlagdir, blíðir og fyrikomandi.

Arbeitt verður í telefonskipanini Total-View, og upplæring verður givin á staðnum.

**Lønin**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarfl okki II. Setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna og stjórnarráðini.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Jeanette E. Blásvær, ráðgeva tlf. 351042 ella 551042.

Skrivlig umsókn skal sendast:
Løgmansskrivstovani
Tinganes
Postsmoga 64
110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er mánadagin 13. august 2007.

---

Løgmansskrivstovan tænir løgmanni í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur samsvarandi stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, harumframt fyrisiting og uttanríkismál.

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

---

KREA.FO TEL 47 80 80

## studulsfólkaskipanin fyri børn

almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

Stuðulsfólkaskipanin fyri børn er skipan á Almannastovuni, sum veitir stuðul til heimabúgvandi børn og ung ið bera brek. Stuðulsfólkaskipanin fevnir um alt landið. Í skipanin starvast gott 100 stuðlar, samskiparar og stuðulsráðgevar.

### Sóknast verður eftir

## NÁTTARVAKTUM TIL STREYMOYAR OG EYSTUROYAR ØKI

Søkt verður eftir álítandi hjálparfólkum at vera náttarvakt heima hjá børnum, ið bera brek. Søkt verður bæði eftir fólki til føst størv og eftir avloysarum. Arbeiðsstaðurin er heima hjá børnunum, og umráðandi er tí, at náttarvaktirnar eru búgvin fólk, ið duga at laga seg til og at virða umstøðurnar í heiminum.

### Sóknast verður eftir

## STUÐLUM TIL VÁGA, EYSTUROYAR OG SANDOYAR ØKI

Søkt verður eftir fólki til ansingar- og røktaruppgávur. Arbeiðstíðin kann vera skiftandi, og tey, ið sett verða, mugu tola broytingar í starvinum. Talan kann eisini vera um samansettar uppgávur. Talan er um fleiri stuðulsuppgávur, við ymiskum tímatali, sum tí verður eftir avtalu.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.

Umsóknarfreistin er 6. august 2007 kl. 12.00
Skrivlig umsókn og møgulig prógv og viðmæli skulu sendast til:

*Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Almannastovan, Tinghúsvegur 14, Postboks 3096, 110 Tórshavn.*

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Oyvind av Skarði, leiðara, allar yrkadagar millum kl. 10 og 12 á tel. 35 35 70

---

# DEKKMASTER.FO

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

# Kulur skutari

EINANS **13.900,-**




**Fæst í hesum litum:**
- Bláur/svartur
- Reyður/svartur
- Gulur/svartur



**Giantco Sprint** er ein nútímans skutari við øllum hugsandi hentleikum.
Hevur t.d. originala fjarstýring við alarmi og fjarstartara.
**Ein kvalitets-skutari fyri lágprís!**

Íroknað prísin er sýn, nummarspjaldur og mvg.

**Hevur m.a.**
- 4-takts motor
- Fjarstýrdan alarm/startara
- 12" alufelgur v/poleraðum kanti
- Polerað bremsugreb
- Hvít blunkljós



DM DEKKMASTER
www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000